

## Pop-café á gamla Reinsarínum

Harmoniorkestrið GHM hevur konsert á gamla Reinsarínum sunnudagin klokkan 16. Á skránni er kendur pop-tónleikur sum er skipaður til harmoniorkestur. Spæld verða løg eftir m.a. Toto, Elton John og Supertramp. Gamla Reinsarí er nýggja spælistaðið í Havn, og konsertin hjá GHM verður fyrsta framførslan á Reinsarínum har blásiljóðføri fylla pallin. Konsertin verður skipað sum ein café konsert, har høvi verður at njóta kaffi/køkur. GHM hevur seinastu árini skipað venjingina í styttri venjingarskeið á 6-8 vikur við ávísum tónleikatema. Tað gevur høvi at gera meira við tónleikin innan ávísa tema'ið og samstundis verður venjingarskeiðið styttri og ríkari. GHM telur í 2008 umleið 30 spælarar, menn og kvinnur, ung og eldri. Konsertin er ókeypis.

# Smyril Line flytast til Suðuroyar



*Borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, sigur, at einasta rætta er at flyta alla umsitingina hjá Smyril Line til Suðuroyar, so at Smyril Line og Strandferðslan kunnu samstarva um sigling innanlands og uttanlands*

**Nú landskassin skal bjarga Smyril Line, er tað eitt gylt høvi hjá politikarum at vísa í verki, at teir meina tað í álvara, tá ið teir tosa um at flyta fleiri størv út um Havnina, sigur borgarstjórin á Tvøroyri**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað einasta rætta, er at flyta alla umsitingina hjá Smyril Line til Suðuroyar.

Tað heldur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Hann sigur, at nú landsstýrið arbeiðir við eini bjargingarætlan fyri Smyril Line, er tað ein partur av tiltakinum, at landsstýrið skal fáa meirilutan í nevndini.

- Samstundis hoyra vit fleiri og fleiri røddir, sum mæla frá at einsklja fleiri almennar ognir, tí royndirnar av tí eru ikki nakað serligar og serfrøðingur hevur enntá staðiliga mælt frá at einskilja Atlantsflog.

### Stórt bakkast

Kristin Michelsen sigur, at Suðuroyggin hevur verið fyri nógvum bakkøstum.

- Fleiri fiskiskip eru løgd, flakavinnan gongur strilti og tað seinasta er, at Føroya Banki hevur sagt fleiri starvsfólkum í Suðuroy upp í sambandi við umskipingar á stovninum.

Samstundis hoyra vit ferð eftir ferð politikarar tosa um økismenning og um at flyta førleikakrevjandi størv út um landið.

Kristin Michelsen heldur, at nú hava politikarar ein gyltan møguleika at vísa hetta í verki.

- Nú ætlanin er at bjarga Smyril Line, hevur landskassin tryggja sær meirilutan í nevndini, men tað er ein spurningur um ikki landið skuldi ogna sær meirilutan í Smyril Line. Men undir øllum umstøðum fær landið meirilutan í nevndini.

### Samstarv við Strandferðsluna

Kristin Michelsen heldur, at ein partur av hesi almenni bjargingarætlanini, eigur at vera, at øll umsitingin hjá Smyril Line verður flutt suður til Suðuroyar.

- Í Suðuroy kann umsitingin hjá Smyril Line verða tengd tætt saman við umsitingini hjá Strandferðsluni, so at báðir stovnarnir kunnu samstarva, um teir ikki vera lagdur beinleiðis saman.

Borgarstjórin á Tvøroyri heldur, at hetta hevði gjørt, at vit fingu eina endaliga loysn á trupulleikanum við at finna avloysaraskipi til Smyril, tá ið hann er í dokk.

- Men samstundis kunnu Norrøna og Smyril samstarva, so at vit ikki missa siglingina til okkara næsta granna, Skotland burtur, tí tað haldi eg er spell.

- Hetta er ein funnin frensur at taka eitt stórt tak fyri at menna eitt niðurpínt øki í landinum og at skapa fleiri nýggj arbeiðspláss í Suðuroy.

Kristin Michelsen sigur, at er sambandið út í heim av so avgerandi týdningi, er tað ein spurningur um ikki landið átti at havt ræðið á tí.

- Landið hevur frammanundan ræðið á Atlantsflogi og nú fær landið eisini ræðið á Smyril Line og sostatt stýrir landið bæði sjóvegis og loftvegis flutninginum. Tað er tí laga manni at samskipa allan flutning, so at hann er okkum til best gagns.

Kristin Michelsen leggur afturat, at við teirri tøkni, sum er í dag, er ongin trupulleiki at hava ein stovn, sum hendan, uttanfyri Havnina, tí nógv tað mesta samskifti er kortini umvegis telefon og teldu.

# Fiskiskip vænta sær eisini almennan stuðul

**Formaðurin í Reiðarafelagum staðfestir, at nú politikararnir bjarga Norrønu undan at fara á húsagang, er tað sjálvsagt, at teir eisini bjarga teimum fiskiskipum, sum eru á veg undir hamaran**

LOFTINGARPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Sjálvandi vænta vit, at kreppurakt fiskiskip fáa somu sømdir frá tí almenna, sum Smyril Line fær.



*Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, ivast ikki í, at nú landskassin bjargar Norrønu undan at fara á heysin, fara teir eisini at bjarga teimum átta fiskiskipunum, ið eru á veg undir hamaran beint nú*

Tað staðfestir Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum.

Hann sigur, at nú politikararnir veita Norrønu almennan stuðul fyri at bjarga henni undan at fara av knóranum, er tað sjálvsagt, at eisini kreppurakt fiskiskip fáa somu sømdir.

Tað var í vár og í summar, at oljan bleiv so dýr, at fiskiflotin kom í eina rættiliga kreppu, tí tey fiskaðu ikki fyri rakstur.

Men tá vóru boðini frá politiska myndugleikanum púra greið og ikki til at misskilja. Og tey boðini vóru, at tað kom ikki upp á tal, at veita fiskiflotanum stuðul til at halda fram.

- Vit fingu púra greitt at vita, at tað, sum ikki kann standa, tað má falla.

Úrslitið av tí er, at nógv skip liggja í løtuni, eins og onnur eru farin í aðra vinnu, eitt nú oljuvinnuna.

- Men tað eru eisini eini átta skip, sum eru á veg undir hamaran, sum støðan er nú.

Viberg Sørensen sigur, at Reiðarafelagið royndi at føra fram fyri politiska myndugleikanum, at eitt átak fyri at bjarga tí kreppurakta fiskiflotanum, er samstundis eitt átak fyri at bjarga øllum landinum, tí tað er fiskiflotin, sum er hornasteinurin í okkara samfelag.

- Men tað var sum at sláa í eina dýnu, tí støðan var, at fiskiflotin mátti sigla sín egna sjógv, staðfestir formaðurin í Reiðarafelagnum.

Hann sigur, at nú hava vit fingið eina aðra samgongu og tað, at Norrøna nú verður bjargað, kundi bent á, at politiski hugburðurin er broyttur.

Hann sigur, at nú fer tíðin at vísa, um landsstýrið eisini er sinnað at bjarga fiskiskipunum, sum eru á veg undir hamaran.

- Tað taka vit sum ein sjálvsagdan lut, hóast ongin enn hevur tikið tey upp á tunguna, sjálvt um talan er um hornasteinin í okkara samfelag, sigur Viberg Sørensen.